Í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein

# Heitari vetrar



Vetrarnir í Russlandi og Kanada eru ikki longur so kaldir, sum teir vóru fyri 50 árum síðani. Mátingar hjá bretska meterologiska instituttinum vísa, at kaldastu vetrardagarnir í Kanada og Russlandi eru fýra stig heitari nú enn í 1950'unum. Klimanevndin hjá ST roknar við, at miðalhitin á jørðini fer at hækka við millum 1,8 og 4 hitastig fram til ár 2100.

# Máttu umbera apríl-søgur




Ein útvarpsstøð í New Zealandi mátti biða um umbering fyri sína apríl-søgu. Støðin The Rock boðaði frá einari konsert við bólkinum Foo Fighters týskvøldið, og túsundtals fólk leitaðu sær til spælistaðið The Powerstation. Fólk tóku frí frá arbeiði, ferðaðust langan tein við flogfari, men eingin konsert var við Foo Fighters. Útvarpsstøðin varð noydd at avsanna sína søga og biða um umbering fyri at hava sent so nógv fólk apríl.

# Mariah tók Elvis



Songkvinnan Mariah Carey hevur nú tikið eitt av metunum hjá Elvis Presley á amerikanska hitlistanum. Sangurin Touch My Body er ovast á Billboard singlelistanum, og hetta er 18. Ferðin, at Mariah Carey hevur ein sang ovast á listanum – og tað er oftari enn Elvis. Hinvegin er eitt bretskt navn framvegis frammanfyri Carey. Tað eru The Beatles, sum vóru 20 ferðir ovasta á listanum.

# Connery sum Bond-skurkur




Í sjey filmum spældi skotin Sean Connery James Bond, men nú sigur pensioneraði sjónleikarin, at hann kundi hugsa sær at spælt brotsmaður í einum nýggjum James Bond filmi.

- Eg hevði einki havt ímóti at spæla viðaftur í einum Bond-filmi, men tað skuldi verið sum skurkur. Eg veit ikki, um teir høvdu viljað goldið mær nógvar pengar fyri tað, sigur 77 ára gamli Sean Connery ið blaðið Daily Mail.

# X-Factor hølvaði TV2 av




DR vann stórt á TV2 í hyggjaratølunum í donskum sjónvarpi farna vikuskiftið. 2,3 milliónir danir hugdu eftir finaluni í X-Factor kappingini fríggjakvøldið, og tað er met fyri hesa kappingina. TV2 hevur sent kappingina "Varm på is" fríggjakvøldið, men har hava lutvíst fáir hyggjarar fylgt við. Fríggjakvøldið hugdu 356.000 fólk eftir sendingini, og tað er tað minsta, síðani sendirøðin byrjaði.

Sosialurin